# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Brynhild Hansen Norðragøta, 85 ár



Hetta er ein føðingardags heilsan til ommu okkara, Brynhild Hansen, sum verður 85 ár tann 1. mai.

Omma er dóttir Magdalenu og Tummas Jákup Thomsen á Geilabø. Hon var gift við Hans Hansen, vanliga nevndur Hans í Køkinum, ið var sonur Amandu og Elias Sofus Hansen í Køkinum.

Omma hevur verið og er eitt sera aktivt menniskja. Hon hevur lagt næstan lív og sál í tað, sum hon brennur fyri. Vit kunnu bara nevna Blásastovu, har hon arbeiddi yvir 30 ár, og Losjan Glotti, har hon í nógv ár hevur sitið í nevndini. Ja, sjálvt tá ið hon var 73 ár, var hon ein av leiðarunum í junior-deildini. Og ikki at gloyma Felagskórið Gøta/Leirvík, har hon sang í nógv ár saman ommudidd, Ragnu, og ommubeiggjunum, Hera og Ásmund.

Enn tann dag í dag gongur hon í bindiklubb, kanska tær ikki binda nógv, men har hon saman við øðrum situr og hugnar sær ein løtu.

Omma og abbi fingu 5 børn. Fýra dreingir og eina gentu. Tilamans eigur omma 11 ommubørn, 6 langommubørn. (á myndini situr Brynhild við langommudóttrini Brynhild)

Omma hevur altíð verið so góð við okkum ommubørnini. Tá ið vit vóru smærri, og foreldur okkara arbeiddu, var hon okkara pleygumamma. Hon gjørdi allari familjuni døgurða, og altíð var okkurt lekkurt omaná. Tá ið summarið var, fóru vit við henni oftani á útflugt, sum oftast bara niðan í bøin, sum er omanfyri húsini, men tað vóru sera hugnaligar løtur. Við okkum høvdu vit teppi og okkurt til matna.

Vit allar systranar svóvu nógv heima hjá ommu. Um tað so var vikuskifti ella mitt í viku. Hvønn morgun, tá ið vit skuldu í skúla, fór omma fyrst upp at gera morgunmatin kláran, og so stríðast við at fáa okkum upp. Og tað tók oftani tíð. Men eitt skuldu vit altíð hava tíð til, og tað var at biðja Faðir vár. Oftani bleiv tann bønin biðin á trappusteininum. Og so var runnið oman á keiina, har Torvald bíðaði eftir okkum.

Tá ið foreldur okkara og yngsta systurin fluttu niður at búgva, vóru vit báðar elstu eftir hjá ommu, tí vit vóru byrjaðar at ganga í skúlanum á Kambsdali. Tá var omma 76 ára gomul, og onki var henni óført. Vit høvdu oftani fleiri ung fólk við inn um kvøldarnar, og sótu langt út á næturnar, men ikki legði omma nakað í tað, og hon gjørdi okkum drekkamunn, og fór so bara í song.

Tá ið vit fingu jólaferiu, og skuldu vit fara niður til Danmarkar at halda jól, helt hon, at hon mátti koma við, eftirsum tað var fyrstu ferð hjá Báru við flúgvara. Tað vóru eini sera annaðleiðis jól, men sera hugnalig.

Omma hevur altíð dámað at verið úti í náttúruni, ja, tað má ein næstan, tá ið ein er bóndakona, tí altíð er tað okkurt at takast við. Líka til hon flutti niðan í Eldrasambýlið Gøtubrá, gekk hon túrar niðan á koyrivegin. Og nú tá ið hon býr í Gøtubrá, er ikki so langur vegur niðan á koyrivegin, har hon plagar at spáka sær ein túr.

Vit vilja enda við at siga takk fyri alt tað, ið tú ert fyri okkum, alt tað tú hevur gjørt fyri okkum, og alt tað tú hevur lært okkum.

Hjartaliga tillukku.

**Ynskja ommudøturnar**
**Hervør, Hannipoula og Bára við fam.**

## Jón Petersen 60 ár



Góði Jón hjartaliga tillukku á 60 ára føðingardegnum, sum var 22 apríl.

Ja hvør skuldi trúð at tú fyllir 60 ár – tú, sum ert so lítið broyttur, síðan vit komu at kenna teg.

Hjálpsamur og arbeiðssamur hevur tú altíð verið. Sjálvt um tú ert deyvur og onki hoyrir, ert tú fyrimyndarligur at samskifta við, og tað fellur lætt at vera saman við tær.

Tað hevur heldur ikki forðað tær at vera virkin og náa teir málsetningar tú setti tær fyri, sjálvt um tú ert deyvur.

Sum dugnaligur skipstimbrari og skipsteknari, aftaná lokið sveinastykki á Tórshavnar skipasmiðju har tú arbeiddi í nøkur ár, komst tú til Vestmanna at arbeiða á skipasmiðjuni.

Sjálvt um tú ert føddur og uppvaksin á Tvøroyri fall tú væl til í Vestmanna. Her fanst tú gentuna Tovu, sum tú hevur verið giftur við í heili 33 ár.

Takk fyri tann týdning tú hevur fyri okkum øll í familjuni og allar tær góðu og ríku løtur vit hava havt í heimi tykkara og framhaldandi koma at njóta saman við tykkum.

**Heilsan við Guds ríku signing**
**Svigarforeldur svigarinnur og svágrar**

## Sigvald Kristiansen 75 ár



Leygardagin 30. apríl verður Sigvald Kristiansen, fyrrverandi kommunulækni á Skála, 75 ár. Sigvald er føddur í Fuglafirði, og foreldrini vóru Alexandur Kristiansen og Súsanna f. Petersen, vanliga nevnd Duda. Sigvald er triðyngstur av 7 systkjum, 4 gentum og 3 dreingjum. Tvær av systrunum og báðir beiggjarnir eru enn á lívi.

Eftir kríggið fór Sigvald, 16 ára gamal til Havnar, at ganga í skúla. Hann tók studentsprógv í 1950 og fór síðan at lesa til lækna. Eftir at hava arbeitt nøkur ár á sjúkarhúsinum í Havn, fór hann saman við familjuni til Grønlands, har hann var lækni í Føroyingahavnini summarið 1964. Í 1965 byrjaði hann í nýggja kommunulæknastarvinum á Skála, og hetta starv røkti hann í 30 ár. Hann giftist í 1955 við Ásu f. Colbjørnsen úr Hesti, sum hevði lært til sjúkrasystir. Ása og Sigvald fingu 4 synir og eiga í dag 15 ommu- og abbabørn.

Eftir at Sigvald fór frá sum kommunulækni, hevur hann verið í ymsum avloysarastørvum víða um landið, líka úr Vági til Klaksvíkar. Á henda hátt hevur hann framhaldandi kunna brúkt sín lærdóm og mongu royndir nógv ár eftir vanligan pensjónsaldur, samstundis sum hann hevur havt betri stundir til annað virksemi, sum hevur hansara áhuga, og tað er mangt og hvat.

Eldrapolitikki hevur hann verið sera virkin í, hann sat í nevndini, sum stóð fyri byggingini av Eysturoyar Ellis- og Røktarheimi, og er í dag sera virkin í pensjonistafelagsarbeiði, bæði her í bygdini og úti um landið. Kirkju- og missiónsarbeiði hevur eisini hansara stóra áhuga, hann hevur sitið í kirkjuráðnum í nógv ár og er eisini organistur. Hann er limur í bygginevndini, sum byggir nýtt meinigheitshús á Skála. Fysta byggistig er liðugt, og annað byggistig er komið væl áleiðis. Harafturat hevur Sigvald í nógv ár verið limur í Lionsfelagnum í Eysturoynni, sum m.a. skipar fyri árligu kappsiglingini í august og listaframsýning á páskum.

Sigvaldi dámar væl úti í náttúruni, at fara á flot ella ein túr í hagan, og hann hevur ferðast nógv saman við familjuni. Vit minnast við gleði aftur á 70 ára føðingardag hansara í Noregi og 70 ára føðingardagin hjá mammu í Skotlandi. Í summar er ætlanin at halda gullbrúdleypsdag teirra í Hetlandi. Hetta fellur saman við Oyggjaleikunum, sum tey bæði hava verið við til fleiri ferðir áður.

Í yngri árum var hann meira bókligur enn praktiskur, og enn verður hann argaður við, at boð máttu sendast eftir elektrikara, tá útiperan skuldi skiftast. Hetta broyttist nógv, tá vit synirnir settu búgv, og hann um somu tíð flutti í egin hús. Nú aftrar hann seg hvørki við at stoypa, smíða ella skrúva. Hann er altíð góður at heita á til at rætta eina hjálpandi hond. Hann er bæði raskur, hugagóður og áhaldandi. Men best er, um tað ikki er fríggjakvøld, tí tá spælir hann flogbólt, og tað skal helst ikki forsømast. Samanhaldið millum flogbótsfólkið er eisini avbera gott.

Sigvald kann í dag hyggja aftur á 75 hendingarík ár við ógvusligum broytingum. Eitt virkið lív, har hann saman við konuni hevur bygt upp eitt hugnaligt heim, sum altíð tekur væl ímóti gestum, serliga abba- og ommubørnunum. Góði pápi, verfaðir og abbi – vit ynskja tær hjartaliga til lukku við degnum og Guds signing framyvir.

**Súni, Arnbjørn, Regin og Bogi v/ familjum**

**PS.** Dagurin verður hildin hjá Eyðgerð og Súna á Skála leygardagin 30. apríl frá kl. 17.

**Dagurin – 27. apríl**

**Ánanias, deyður 375.** Kristin munkur, sum varð tikin av døgum í Persiu. Summir halda, at her er talan um tann Ánanias, sum er umtalaður í Ápostlasøguni kap. 9 og ørindini 10 til 19.

Fríðrikur Petersen deyður 1917.